# kara hjørtu



*- Boðskapurin, sum ljóðar út úr allahalgannadegi, er eisini ein boðskapur um vón og framtíð, ein boðskapur, sum eggjar til at líta upp og fram, tí teir farnu og vit eru umgivin av Gudi, segði Bjarni Bæk, dómpróstur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

hava allahalgannadag til hesa minningarløtu. Hesin dagur hevur heilt frá kirkjunnar byrjan borið okkum ein boðskap um vón upp ímóti deyðanum og um nýggjar lívsmøguleikar. Boðskapurin leggur eina lívsins glæmu inn yvir minnini og bjóðar okkum at minnast í áliti á, at teir farnu fóru í Guds hond og eru í hansara varðveitslu til uppreisnardagin.

Bjarni segði, at hetta ger á ein serligan hátt boðskapin, sum ljóðar út úr allahalgannadegi, til ein boðskap um vón og framtíð, ein boðskap, sum eggjar til at líta upp og fram, tí teir farnu og vit eru umgivin av Gudi.

- Teir farnu hvíla til uppreisnardagin - antin teir fingu eina váta grøv, ella teir blivu funnir, og tit fingu eina grøv at vitja. Vit eru umgivin av Gudi, meðan vit reisast og liva og virka og taka lívið uppá okkum.

**Trúgvin og veruleikin**

Dómpróstur segði, at trúgvin hjálpir okkum at síggja tann broytta veruleikan í eyguni og at umhugsa, hvussu vit kunnu vera við í teimum nýggju umstøðunum.

– Hetta kunnu vit loyva okkum, tí Kristus er upprisin og hevur tikið okkum uppí hjá sær. Av tí fáa orðini hjá Jesaja profeti sína serstøku dýpd og nærveru.

Bjarni Bæk segði at enda, at vit minnast ikki út í tóman heim, men vit minnast við Guds framtíð og uppreisnardegnum fyri eyga.

- At minnast teir farnu í ljósinum av allahalgannadegi, er samstundis ein innbjóðing til at líta fram og taka lívið uppá seg, segði dómprósturin.

# Ein errin og kritiskur vinnari



*Bogi Hansen heldur takkarrøðu í konsertsalinum í Tivoli*

*Mynd: Magnus Dam*

**- Eg eri fegin um hendan heiður, eg havi fingið, og eg eri fegin um, at Norðurlandaráðið hevur veðurlagsbroytingar í huganum. Vit liva væl í dag, men ein loysn á veðurlagsbroytingunum er langt burtur. Skulu vit umgangast eina náttúruvanlukku, mugu vit "handla" nú, segði Bogi Hansen, tá ið hann hevði tikið ímóti virðislønini í konsertsalinum í Tivoli í gjárkvøldið**

VIRÐISLØN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið fekk Bogi Hansen, havfrøðingur og professari í havfrøði, handað ársins náttúru-og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins, sum er upp á 350.000 krónur.

Virðislønin varð handað í konsertsalinum í Tivoli í Keypmannahavn, har aðrar virðislønir eisini vórðu handaðar.

At føroyski havfrøðingurin skuldi fáa hesa heiðurligu virðisløn, kunngjørdi Norðurlandaráðið júst sama dag, sum Bogi Hansen varð tilnevndur professari í havfrøði við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya.

Í grundgevingum sínum fyri at lata Boga Hansen heiðurslønina, sigur Norðurlandaráðið, at hetta er fyri hansara umfatandi gransking innan veðurlag og havfrøði í Norðurhøvum. Dentur verður lagdur á hansara gransking í sambandi við havstreymar, og hvørjar avleiðingar tað kann fáa, um Golfstreymurin broytir kós.

Fleiri onnur uppskot vóru um, hvør skuldi fáa henda heiður Norðurlandaráðsins í ár. At Bogi fekk virðislønina í kapping við nógv onnur, sigur ikki so lítið um hansara dygdargóða og miðvísa granskingararbeiði.

**Náttúruvanlukka**

Tíverri eydnaðist okkum ikki at fáa orð á Boga Hansen, áðrenn blaðið fór av húsinum í mongun, tí hann var á veg heim til Føroya í flogfari.

Men á heimasíðu hjá Norðurlandaráðnum verður sagt, at tað var ein errin, men kritiskur Bogi Hansen úr Føroyum, sum tók ímóti virðislønini í Tivoli í gjárkvøldið.

Á heimasíðuni verður sagt, at veðurlagsbroytingar kunnu føra til stórar broytingar á jørðini og eitt, sum nevnt verður í hesum sambandi, er vandin fyri, at vatnstøðan fer at veksa, tí veksandi hitin fær ísin at smelta.

- Eg eri fegin um hendan heiður, eg havi fingið, og eg eri fegin um, at Norðurlandaráðið hevur veðurlagsbroytingar í huganum. Vit liva væl í dag, men ein loysn á veðurlagsbroytingunum er langt burtur. Skulu vit umgangast eina náttúruvanlukku, mugu vit "handla" nú, segði hann.

Í takkarrøðu síni segði Bogi Hansen seg vóna, at norðurlendsku stjórnirnar fara at broyta kós og fara at gera eitt nógv miðvísari arbeiði fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassi – og at hesar tjóðir eisini gera sítt til, at alheimurin minkar um samlaða útlátið.

- Men tað er um at vera ov seint, legði virðislønarvinnarin aftrat.

**Bogi Hansen**

Professarin í havfrøði og virðislønarvinnarin er útbúgvin cand. scient. í alisfrøði og lic. scient. í havfrøði.

Árini, 1975 til 1982, var hann lektari í alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, og síðani 1982 hevur hann starvast sum havfrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni.

Bogi Hansen er virkin í fleiri altjóða granskingarverkætlanum og hevur skrivað hópin av greinum og bókum um evnir, sum snúgva seg um havfrøði.



*Ein errin, men kritiskur Bogi Hansen, tók ímóti virðislønini á 350.000 kr.*

*Mynd: Magnus Dam*